FKF_jour: 09-98.1

Løgtingið

28. mai 2010
Mál: 10/00450-1
Tygara skriv:
Viðgjørt:

Løgtingsmál nr.: XX/ Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum

§ 1

Í løgtinglóg nr. 107 frá 22. desember 1999 um áseting og javning av almannaveitingum, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 106 frá 12. desember 2008, verður gjørd hendan broyting:

Í § 2 verður “3%” broytt til: “0%”.

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og hevur virknað fyri útgjalding av veitingum frá og við januar mánaði 2011.

Kap. 1. Almennar viðmerkingar
Endamálið við uppskotinum er at minka um vøksturin í útreiðslunum á almannaøkinum. Sambært Búskaparfrágreiðing 1 frá 2010, verður eingin lønarjavning komandi árini fram til 2015, og mett verður, at sostatt skuldi eingin javning av almannaveitingum verið samsvarandi.
Mett verðursambært búskaparfrágreiðingini, at minkingin av árligu javningini úr 3% í 0%, fer at spara landskassanum fyri útreiðslur upp á 12 mill. kr. í 2011 og samsvarandi hvørt ár eftirfylgjandi.

Hendan broyting fer at merkja, at móttakari av almennu veitingini, frameftir fer at fáa somu veiting, sum hevur verið í 2010. Frádrattarfríu upphæddina til eitt nú fyritíðarpensjónistar, fer eisini at verða tann sama sum í 2010.

Á sama hátt verður upphæddin til egingjald til sambýlir og heimahjálp ikki javnað frameftir. Sama verður galdandi viðvíkjandi egingjaldi sambært fyriskipanum fyri heimleys, sum ikki verða javnað frameftir.

Hetta merkir, at inntøkurnar til Nærverkið, sum koma frá egingjaldi til sambýlir og heimahjálp, ikki fara at vaksa. Inntøkurnar til fyriskiparnir fyri heimleys viðvíkjandi egingjaldi til uppihald v.m., verður samstundis óbroytt.

Kap. 2. Avleiðingar av uppskotinum
Fíggjarliga avleiðingar fyri land og kommunur:
Við at minka um árligu javningina úr 3% í 0%, minka útreiðslurnar til almannaveitingar sambært Búskaparfrágreðing 1 við 12. mio. kr.

Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur:
Mett verður, at uppskotið ikki viðførir umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

Fíggjarligar avleiðingar fyri vinnuna:
Mett verður, at uppskotið ikki viðførir fíggjarligar avleiðingar fyri vinnuna.

Avleiðingar fyri umhvørvið:
Mett verður, at uppskotið ikki viðførir avleiðingar fyri umhvørvið.

Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum:
Mett verður, at uppskotið ikki viðførir avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

Sosialar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir:
Uppskotið fer at merkja, at móttakari av sosialu veitingini, fer at fáa somu upphædd í 2011, sum var galdandi i 2010.
Uppskotið fer at merkja, at fyriskipanir fyri heimleys frameftir, ikki fær økt um inntøkurnar sum standast av egingjaldi til uppihald fyri heimleys.
Uppskotið fer at merkja, at egingjaldið til sambýlir og heimahjálp ikki verður javnað, og sostatt verður sama egingjald galdandi fyri 2010.

Avleiðingar fyri millumtjóða sáttmálar:
Mett verður, at uppskotið ikki viðførir avleiðingar fyri millumtjóða sáttmálar.

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304000 • Fax: +298 354046 • E-mail: amr@amr.fo

	Fyri landið/lands-myndugleikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss/øki í landinum	Fyri ávísar sam-felagsbólkar/ felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar/ búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Ja	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar				Ja	

Kap. 3. Serligar viðmerkingar

Til § 1:
Lógarbroytingin hevur við sær, at almannaveitingarnar sambært hesi lóg frameftir verða javnaðar við 0% árliga.

Til § 2:
Gildiskomuregla.

Almannamálaráðið, 28. mai 2010

Rósa Samuelsen
landsstýriskvinna

/

Eyðun Mohr Hansen